*Framhald av síðu 15*



*Svein Christiansen, verkætlanarleiðari, og Kári Johansen, arbeiðsformaður, lata væl at arbeiðinum við Norðoyatunlinum*

Menn mugu standa og mest sum rópa inn í oyruni á hvørjum øðrum. Teir hava allir sjálvandi oyravernd.

Teir eru komnir umleið 20 metrar undir havyvirflatuna, men enn vanta einir 1.300 metrar í, áðrenn teir eru komnir út undan fjallinum og í sjálvan havbotnin.

### Skiftið millum fláir

Arbeiðsfólkið má av sonnum sigast at vera á veg út úr Klaksvík nú. Teir eru júst lidnir at bora niður í gjøgnum Klaksvíkslindina, sum tað verður kallað.

Tilfarið úr Klaksvíkslindini var ómetaliga gott, men tað sum nú liggur fyri framman er minni gott.

Skiftið millum Klaksvíkslindina og næstu fláina sæst týðuliga á vegginum, har hendan stóran maskinan áhaldandi heldur fram við at bora. Næstan knívskorin linja skilir tað ljósa og harða grótið í Klaksvíkslindini frá tí heldur reydligara og eyruta tilfarinum, sum kemur úr tí næstu fláini.

– Hetta tilfarið fáa vit tíverri ikki nýtt til so nógv, sigur arbeiðsformaðurin, Kári Johansen. Men hann letur samstundis væl at arbeiðsgongdini.

– Vit eru eina til tvær vikur framman fyri tíðarætlanini, so ikki kann annað sigast enn, at tað gongur framúr væl við arbeiðinum, sigur hann.

Forsøgnir verða javnan gjørdar, roknaðar út frá umleið fýra vikum. Tann seinasta sigur, at fast verður millum Borðoynna og Eysturoynna fyrstu vikuna í mai komandi ár.

### Fjallið gevur seg

Verkætlanarleiðarin Svein Christiansen greiðir sera hegnisliga frá gongdini, og hvussu arbeiðið fer fram.

Tá so og so nógvir metrar eru boraðir, fara nakrir menn aftaná og gera eina eftirtrygging av lofti og veggum í tunlinum. Hetta verður gjørt við bæði boltum og sproytubetongi.

– Vit hava nýtt munandi meiri sproytubetong í norðoyatunlinum, enn vit gjørdu í Vágatunlinum, sigur hann.

Hann greiðir frá, at tað kemst av, at tað liggur eitt fjall, sum er meira enn 600 metrar høgt uppi yvir teimum, og nú eru teir komnir einar 20 metrar undir havyvirflatuna.

Svein sigur eisini, at tað kemur meira enn fyri seg, at teir hoyra, hvussu fjallið gevur seg uppi yvir teimum, men hann leggur dent á, at tað er púra náttúrligt og eigur at vera so.

– Tað er tí, vit tryggja loftið, og hatta hava vit so mangan upplívað, tá vit hava gjørt tunlar í Noregi tildømis, greiðir hann frá.

### Óvist við dagfesting

Í sáttmálanum millum PF Norðoyatunnilin og Føroya Konsortium stendur, at tunnilin skal verða klárur at taka í nýtslu tann 1. august 2006.

Fyri fyrst heldur Svein Christiansen seg til tað. Men so sigur hann, at tað helst fara at koma nærri og nágreiniligari boð um, nær tunnilin kann lata upp, móti vári.

– So longi, sum vit bora, er ikki lætt at spáa nakað, tí tað er jú her, at vit kunnu koma út fyri teimum mest óvæntaðu viðuskiftunum, sum kunnu seinka arbeiðinum, greiðir hann frá. Enn er tó onki óvæntað hent teimum.

Røddir hava verið frammi um, at tunnilin allarhelst fer at lata upp longu um ársskiftið 2005/06. Hesum vísir Svein ikki fullkomuliga aftur, men hann leggur dent á, at so skal alt ganga sum smurt allatíðina.

– Málið hjá okkum er sjálvandi at verða liðug so nógv fyrr sum møguligt, og vit vóna eisini, at tað kann fara at verða nakrar mánaðir fyrr, men heilt fram til ársskiftið, tað veit eg nú ikki, sigur Svein og yppir øksl.

Hann leggur afturat, at tað eisini er týdningarmikið at vera tíðliga úti við einum boði uppá, nær væntast kann, at tunnilin verður liðugur, tí har eru jú viðurskifti at taka fyrilit fyri. Sum til dømis Strandferðslan, sum jú skal fremja nakrar broytingar, tá Dúgvan ikki longur siglir um Leirvíksfjørð.

– Men áðrenn spreingingin er liðug, verður onki alment dato sett á, siga teir báðir Kári og Svein.

Ein fyrimunur, sum er við arbeiðinum í norðoyatunlinum fram um vágatunnilin er, at nógv arbeiðið verður gjørt samstundis, sum boringin fer fram. Hetta fera at spara teimum nógva tíð í seinna endanum.

Samtakið hevur fingið somu tíð at gera norðoyatunnilin sum vágatunnilin. Og hann var jú liðugur langt áðrenn, spátt varð. Men so skal samstundis havast í huga, at hesin tunnilin er munandi longri enn vágatunnilin.

### Út aftur í ljósið

Ferðin inn í tunnilin at eygleiða arbeiðið er komin at enda, og eftir ein líka rumblutan túr út aftur úr tunlinum, standa vit aftur úti í ljósinum og ikki minst friðinum.

Uttan fyri tunnilin koyra lastbilar aftur og fram eftir vegnum út til bátahylin, har stóra økið, har grótið verður knúst, liggur. Men tað er lítið afturímóti ganginum inni í tunlinum, so tað gevur ein sær næstan ikki farum.

Millum lastbilarnar sást eisini onkur persónbilur, sum er farin at forvitnast.

Spurdir um teir merkja nógv til forvitin fólk, nikka báðir smílandi.

– Ja, fólk eru øgiliga forvitin og spent, haldi eg. Men tað er sum so ikki nakar trupulleiki av teimum, sigur Kári.

### Vegagerð

Eitt er tunnilin sjálvur, sum skal gerast, men so eru tað vegirnir og annað, sum eisini skal gerast.

Vegurin frá tunnilsmunnanum skal broytast. Hann varð gjørdur, sum hann er, tí tá vóru ognarviðurskiftini millum PF Norðoyatunnilin og eigararnar ikki avgreidd. Men tað eru tey í dag, so skjótt verður vegurin gjørdur, sum hann skal verða.

So er tað vegurin, sum í dag gongur út í bátahylin. Hann dettur burtur og ístaðin er ein nýggjur vegur í gerð, sum kemur at liggja niðri undir sjálvum landsvegnum.

Vegurin tvørtur um Gerðabø er asfalteraður, men enn restar tann seinasti meturin í. Hetta er ikki uppgávan hjá Føroya Konsortium at taka sær av, sum skilst, men hjá Landsverki. Rundkoyringin kemur so at liggja beint við verkstaðið hjá Føroya Konsortium, og endar uppgávan hjá teimum somuleiðis har. So er tað upp til kommununa at gera vegin fram við tekniska skúla og studio Pegasus.

Inni í tunlinum verður framhaldandi arbeitt við at gera klárt til at løða, og seinni verður so aftur sprongt. Tá eru teir so komnir einar fimm metrar longur inn í Háfjall.




*Her sást, hvussu langt boriarbeiðið undir Leirvíksfirði er komið*

*Kelda: www.tunnil.fo*





*– Jógvan hevur havt eina ov stramma linju. Tað er órímuligt, at fólk, ið hava búð her í fleiri ár, og lagt nógv fyri at tillaga seg til føroysk viðurskifti, verða send av landinum, sigur Kristian Magnussen*

# Keldumaðurin farin ov langt

**Hvørki Sambandsflokkurin ella Javnaðarflokkurin siga seg taka undir við førda útlendingapolitikkin um hjá Jógvani við Keldu. Vit mugu skilja ímillum, hvørjir útlendingar hava tillagað seg til føroyska samfelagið, og teir sum standa á gáttini til at koma inn í landið, siga Kristian Magnusen og Kaj Leo Johannsen**

ÚTLENDINGAJAGSTRAN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Hann hevur verið lagdur undir at spíra til fremmandahatur á tingsins røðarapalli. Atfinningarnar ímóti førda útlendingapolitikkinum hegla yvir landsstýrismannin í innlendismálum, Jógvan við Keldu. Í bløðunum seinastu dagarnar hava orð sum útreinsan og forfylging verið sett í samband við útlendingapolitikkin hjá samgonguni.

Á samgongufundi mánadagin umrøddi samgongan útlendingapolitikkin. Samgongan kom ásamt um, at neyðugt er at fara hóvligari fram. Síðan samgonguskjalið varð undirskrivað hevur lítið og einki verið at hoyrt til støðuna hjá bæði Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum í útlendingamálum, meðan tað tykist sum um Fólkaflokkurin einsamallur hevur sett dagsskrá í hesum máli.

Vit hava tí vent okkum til umboð fyri Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin fyri at fáa greiðu á, hvørja støðu flokkarnir hava til førda útlendingapolitikkin hjá Jógvani við Keldu og Fólkaflokkinum.

### Órógv

Formaður í tingbólki Javnaðarfloksins, Kristian Magnussen, og formaðurin í Sambandsflokkinum, Kaj Leo Johannesen, eru báðir av teirri áskoðan, at alt ov nógv rok hevur verið á útlendingaøkinum.

– Jógvan hevur havt eina ov stramma linju. Tað er órímuligt, at fólk, ið hava búð her í fleiri ár, og lagt nógv fyri at tillaga seg til føroysk viðurskiftið, verða send av landinum, sigur Kristian Magnussen

Formaðurin í Sambandsflokkinum tekur undir við Kristiani Magnussen.

– Sambandsflokkurin kann ikki taka undir við linjuni hjá landsstýrismanninum. Eg havi áður gjørt vart við, at handfaringin av málinum hevur í fleiri førum verið óheppin, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Munur á

Bæði umboðini fyri Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin halda, at greiður skilnaður skal vera á útlendingunum, ið hava búð í Føroyum og tillaga seg til føroysk viðurskifti og teimum, sum standa á gáttini at fáa uppihalds- og arbeiðsloyvi.

– Hava vit fyrst bjóðað fólki vælkomnum inn í landið, er neyðugt at taka avleiðingarnar av tí og fara væl við teimum, heldur Kristian Magnussen.

Kaj Leo Johannesen er av somu áskoðan

– Tað kann skaða okkara umdømi almikið, um vit fara undir at blaka fólk úr landinum, sum hava familju og búðstað her, sigur formaður Sambandsfloksins.

*Tekur Javnaðarflokkurin undir við einum sonevndum útlendingastoppi?*

– Er talan um ein útlending, sum skal til Føroya at arbeiða, har stórur tørvur er á hansara arbeiðsmegi, haldi eg einki er til hindurs fyri, at hann skal sleppa inn í landið. Er hinvegin talan um útlendingar, ið skulu arbeiða í vinnu, har stórt arbeiðsloysi ræður, haldi eg tað er órímuligt at lova teimum inn. Uttan mun, hvønn politikk samgongan kemur ásamt um, er tað ómetaliga týdningarmikið, at vit hava fullan stuðul í fólkinum, sigur Kristian Magnussen

### Óvist

Spurdur um umdømið hjá føroyingum uttanlands hevur tikið skaða av avgerðunum hjá innlendismálaráðnum seinastu vikurnar, svarar Kaj Leo Johannesen, at tað er ilt at meta um.

– Høvdu vit hildu á við linjuni hjá Innlendismálaráðnum er vandi fyri, at vit skjótt høvdu fingið eitt keðiligt umdømi. Vit mugu hava í geyma, at føroyingar gjøgnum tíðina altíð hava arbeitt nógv í øðrum londum, og tí kunnu vit ikki loyva okkum at fara illa við teimum útlendingum, sum arbeiða her, sigur formaður Sambandsfloksins.

# Minnir um rasismu

**– Grundleggjandi er hugburðurin mótvegis útlendingum broyttur í hesi samgonguni. Samgongan hevur bert uppfunnið eina grundgeving sum eitur arbeiðsloysi fyri legimitera sín stramma útlendingapolitikk, heldur Bill Justinussen**

ÚTLENDINGAJAGSTRAN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Samgongan hevur tveitt grundregluna um næstrakærleika fyri borð.

Tingmaðurin hjá Miðflokkinum, Bill Justinussen, sigur, at flokkurin er ómetaliga ónøgdur við framferðarháttin hjá Jógvan við Keldu á útlendingaøkinum.

– Førdi politikkurin ger seg inn á sakleys menniskju, og politikkurin minnir ikki sørt um rasismu, vísir miðflokkamaðurin á.

Bill Justinussen heldur, at spurningurin um útlendingapolitikk Føroya eisini snýr seg um moralska ábyrgd.

– Tú mást minnast, at føroyingar fluttu í stríðum streymi av landinum undir kreppuni, og væl varð tikið ímóti okkum. Londini, sum føroyingar fluttu til, høvdu væl lægri arbeiðsloysi enn vit hava í dag, og tí er tað burturvið, at vit eru farin undir at blaka útlendingar út, sigur Bill Justinussen

### Íspunnin grundgeving

Tingmaðurin hjá Miðflokkinum heldur, at grundgevingin hjá samgonguni um, at økta arbeiðsloysið ger tað neyðugt við einum strammari útlendingapolitikki eru íspunnin.

– Grundleggjandi er hugburðurin mótvegis útlendingum broyttur í hesi samgonguni. Samgongan hevur bert uppfunnið eina grundgeving sum eitur arbeiðsloysi fyri legimitera sín stramma útlendingapolitikk, heldur Bill Justinussen.

### Óvirkin samgonga

Miðflokkurin heldur lítið um leiklutin hjá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum í samband við útlendingapolitikkin hjá samgonguni.

– Tað er einki yvir at dylja, at tað fyrst og fremst er Jógvan við Keldu og hansara flokkur, sum mynda útlendingapolitikkin hjá samgonguni. Vit hava hoyrt til nakað av ónøgd í tinginum frá bæði Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum, men sum heild hava hesir flokkar verið alt ov óvirknir í spurninginum, tí longu nú liggja fleiri syrgiligar lagnur í klemmu, vísir Bill Justinussen á.



*Vit hava hoyrt til nakað av ónøgd í tinginum frá bæði Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum, men sum heild hava hesir flokkar verið alt ov óvirknir í spurninginum, tí longu nú liggja fleiri syrgiligar lagnur í klemmu, vísir Bill Justinussen á*